## Sleppa ikki úr Gaza

Ísraelskiu mannarættindafelagsskapirnir Hamoked og Gisha leggja ísraelsku myndugleikarnar undir at skilja Gaza og Vestara Áarbakka sundur við umsitingarligum tiltøkum. Felagsskapirnirn siga, at nýggjar reglur hjá ísraelsku myndugleikunum fara at gera tað so at siga ógjørligt hjá einum palestina at flyta bústað úr Gaza til Vestara Áarbakka. Blaðið Jerusalem Post skrivar, at myndugleikarnir fara bara at loyva fólki at flyta, tá talan er um heilt serligar umstøður. Hamoked og Gisha siga, at tann broytta umsitingin er enn ein ísraelsk roynd at gera tann landafrøðiliga og politiska skilnaðin millum Gaza-geiran og Vestara Áarbakka uppaftur størri, enn hann longu er.

## Arbeiða uttan løn

Leiðslan í British Airways vil hava starvsfólkini at sleppa einari mánaðarløn fyri at hjálpa felagnum. Sambært BBC hava øll tey umleið 30.000 starvsfólkini hjá British Airways fingið eina áheitan frá leiðsluni um at arbeiða uttan løn. Tey kunnu so velja, um tey vilja sleppa einari vikuløn ella tveimum ella helst einari heilari mánaðarløn. Willie Walsh, sum er aðalstjóri í BA, hevur sagt, at hann skal ikki hava nakra løn í næsta mánað. Sjálvur sigur hann, at tiltakið er neyðugt, skal flogfelagið yvirliva. British Airways hevði meiri enn 400 milliónir pund í halli í 2008 orsakað av dýrum brennievni og øðrum útreiðslum.







*Gjaldssteðgurin hjá P/F Kósini gongur út í dag, og í morgun var ikki vist, hvat fer at henda við virkinum. Líkt er tó til, at Føroya Banki, sum nú er einasti kredittorur, fer at biðja um, at gjaldssteðgurin verður upphevaður*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Góðir útróðrardagar hjá klaksvíksbátum

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Útróðrarbátarnir, Líðhamar og Reynsmúli í Klaksvík, hava landað á Kósini bæði í dag og í gjár.

Í gjár hevði Líðhamar 10.000 pund, og í dag høvdu teir 9.000 pund.

Somu dagar hevur Reynsmúli havt umleið 5.500 pund hvønn dagin.

Á landingarmiðstøðini í Klaksvík sigur Pól Fuglø, landingarformaður, at slagið hjá Líðhamri og Reynsmúla er hvítingur og hýsa, harav umleið tveir triðingar er hvítingur.

Mánadagin landaði línuskipið Jákup B stívliga 43.000 pund í Klaksvík, og í morgun landaði línuskipið Kvikk 45.000 pund.

Størsta landingin av línufiski í Klaksvík hesa vikuna hevur Fugltúgvan, sum væntandi landar 100.000 pund í morgin.

Meðan slagið hjá Jákupi B serliga var hvítingur og hýsa, er meginparturin av veiðini hjá Fugltúgvuni brosma og longa.

### Eisini trolfiskur

Mánadagin landaði eisini trolbáturin Varðin í Klaksvík. Teir høvdu stívliga 29.000 pund.

Í morgin landa ísfiskatrolararnir, Safir og Smaragd, sum Kristian Martin Rasmussen og synir hansara eiga.

Teir vænta, at kørini verða full, tá túrur er lokin.




*Nakrar landingar hava verið í Klaksvík hesa vikuna, og í dag landa ísfiskatrolararnir, Safir og Smaragd*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*